# KUPI Á BORG



*Jákup á Borg spældi ein branddyst móti Litava í 2009. Føroyar vann 2-1*

við Zinedine Zidane á liðnum, tekur ímóti. Føroyar tapa 3-0. – Eg kann reypa mær av, at Zidane hevur gjørt fríspark móti mær, sigur Jákup á Borg flennandi í viðtalu við Dimmalætting í juli í 2010.

## AVSETTUR

**JUNI, 2005:** 25 ára gamli Jákup á Borg hevur átt plássið sum miðvallari í høgru seinastu fýra árini. Hansara avrik hava sveiggjað nógv, men



*Jákup og hinir á føroyska landsliðnum stríddist væl í regninum, tá Luksemburg vitjaði á Svangaskarði í 2001*

HB-leikarin hevur verið millum teir mest eyðsýndu fleiri ferðir. Hendrik Larsen, landsliðsvenjarin, gevur honum tó ikki møguleikan, tá Írland vitjar á Tórsvølli. – Tað er sjálvandi eitt stórt vónbrot. Men eg var ikki meira fornermaður enn so, at eg vildi vísa, hvat eg standi fyri, sigur Jákup á Borg, sum spælir seinastu 10 minuttirnar, aftaná dystin. Írlandi vinnur 2-0.

## SORL!

**SEPTEMBER, 2006:** Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, væntar, at Jákup á Borg verður millum leikararnar, sum taka ábyrgd á landsliðnum, nú aldursskiftið skal fremjast. Tað gongur ikki væl í fyrstu royndunum. Føroyar tapa 6-0 á heimavøli móti Georgia, og 6-0 á útivølli móti Skotlandi, og Jákup á Borg røkir uppgávuna sum høgri bakkur. Hann er framvegis bjartskygdur. – Tað er tungt at tapa tveir dystir 6-0, men tá ið eitt nýtt lið skal spælast saman, so kemur slíkt fyri, sigur hann.

## TRÝSTUR

**SEPTEMBER, 2007:** 27 ára gamli Jákup á Borg er brádliga ikki sjálvskrivaður á landsliðnum longur. Hann verður fluttur í heilum. Á útivølli móti Litava røkir hann uppgávuna sum vinstri bakkur. – Við royndunum, sum hann hevur, so roknaði eg við, at hetta var skilabetri, enn at geva Johan Troest Davidsen sína debut, sigur Jógvan Martin Olsen aftaná dystin. Føroyar tapa 2-1.

## ALBOGAN Í HØVDIÐ

**OKTOBER, 2008:** Jákup á Borg hevur mist liðskiparabandið í HB og skiftir í summarsteðginum til barndómsfelagið B36. Hann er nógv plágaður av einum skaða í lærkrykanum. Men hann er til dystin fús, tá Rumenia vitjar á Tórsvølli. Geylið hoyrist um allan Tórsvøll, tá Sorin Ghionea langar albogan í høvdið á Jákupi, og Ghionea verður útvístur. – Hann slóð út eftir mær og rakti meg í andlitið. Eg spældi eitt sindur upp á tað, men í hesum spælinum mast tú gera tær dælt av slíkum støðum, sigur Jákup á Borg aftaná dystin. Rumenia vinnur 1-0.

## ASKHAM YNSKIR IKKI JÁKUP

**MARS, 2009:** Heðin Askham fær ábyrgdina av føroyska landsliðnum í venjingardystinum móti Íslands. Og Askham velur ikki at hava 29 ára gamla Jákup á Borg við í hópinum. – Eg eri ógvuliga vónsvikin. Eitt er, at venjarin ikki metir meg hava tað, sum skal til, fyri at spæla á landsliðnum. Men eg havi verið partur av hópinum í meira enn 10 ár, og tí haldi eg tað vera løgið, at eg einki hava fingið at vita undan úttøkuni, sigur Jákup á Borg. Mikkjal Thomassen, venjari hjá B36, stuðlar Jákupi. – Eg haldi tað vera óumhugsað og ótrúliga respektleyst, sigur Mikkjal Thomassen.

## STRÍÐIR SEG AFTUR

**SEPTEMBER, 2009:** Jákup á Borg er framvegis skaðaplágaður, og tað ávirkar hansara pláss á landsliðnum. Tað er ein sannroynd, at hansara royndir er eingin fyrimunir longur. Brian Kerr velur óvæntað at hava Jákup á Borg sum framrættaðan miðvallara í heimadystinum móti Litava. Og tað var ein røtt avgerð. Jákup á Borg spælir framúrskarandi, tá Føroyar vinna 2-1 á Litava.

## FARVÆL

**JULI, 2010:** Aftaná 69 landsdystir og tvey mál, boðar Jákup á Borg frá, at hann er givin á føroyska landsliðnum. 30 ára gamli havnarmaðurin hevur ikki orku og tíð at umboða Føroyar longur. Hann hevur hugsað um avgerðina leingi. Orsøkin er fyrst og fremst, at hann hevur verið illa plágaður av skaðum. – Eg eri eingin unglingi longur. Eg havi tørv á hvíld, og eg seti meg ikki føran fyri at spæla við fullari megi á landsliðnum longur, sigur Jákup á Borg. Brian Kerr, landsliðsvenjari, harmast avgerðina.

*uni@sosialurin.fo*

